Dagf. 19. juni 2020
HMR J. nr. 20/00538-5

Kaj Leo Holm Johannesen
landsstýrismaður

Svar

upp á

fyrispurning nr. 97/2019 eftir § 52a í tingskipanini um heimleys frá Una Rasmussen, løgtingsmanni

Spurningurin var soljóðandi:

1. Hvussu nógv heimleys liggja og hava ligið á teimum trimum sjúkrahúsunum seinastu trý árini?

2. Hvussu gomul eru tey heimleysu, ið liggja á sjúkrahúsunum kring landið?

3. Hvussu leingi liggja tey heimleysu í miðal á sjúkrahúsunum, áðrenn tey verða útskrivað?

Svar:

1. **Hvussu nógv heimleys liggja og hava ligið á teimum trimum sjúkrahúsunum seinastu trý árini?**

Sambært sjúkrahúsverkinum eru síðani 2017 tilsamans 19 borgarar skrásettir sum innlagdir á teimum trimum sjúkrahúsunum longri enn neyðugt, tí onki heim var at útskriva til. Her skal tó fyrivarni takast fyri, at summar deildir ikki hava skrásett systematiskt fyrr enn nú, og tí kann tað veruliga talið vera nakað hægri.

Í løtuni eru 2 borgarar innlagdir, sum eru liðugt viðgjørdir, men sum tað ikki ber til at útskriva, tí ongin bústaður er.

2. **Hvussu gomul eru tey heimleysu, ið liggja á sjúkrahúsunum kring landið?**

Tann yngsti borgarin, sum hevur ligið á sjúkrahúsinum longri enn neyðugt orsakað av vantandi bústaði, var fyrst í 40'unum. Tann elsti var 64 ár. Miðalaldurin er 56 ár.

3. **Hvussu leingi liggja tey heimleysu í miðal á sjúkrahúsunum, áðrenn tey verða útskrivvað?**

Miðal dagatalið, eftir at heimleysu borgarnir vóru medisinskt liðugt viðgjørdir, er 76 dagar. Tann, sum hevur verið innlagdur longst eftir at viðgerðin varð liðug, var innlagdur í 361 dagar, meðan onkur bert hevur verið innlagdur í styttri tíð, áðrenn ein loysn var funnin.

Heilsumálaráðið, 19. juni 2020

Kaj Leo Holm Johannesen
landsstýrismaður